UMHVØRVISVIKAN
10.-16. MAI 2010

# Stuðul

Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvis-tiltøk.

**Stuðul verður latin til verkætlanir sum:**

- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku - og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2010 og skulu sendast til:

**Tórshavnar kommunu**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32 • 110 Tórshavn

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 10. til 16. mai 2010.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Ein millión
## til at marknaðarføra Føroyar

Bjóðið verðini vælkomnari til Føroya at ferðast. Søkið um stuðul og verið við til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál!

VisitFaroeIslands bjóðar til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál og setir 1.000.000 krónur av til **serlig** marknaðarátøk. Føroysk virki og feløg kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir "krónu fyri krónu" leistinum. Tað merkir, at umsøkjarin rindar sjálvur eina krónu fyri hvørja krónu, sum VisitFaroeIslands letur í stuðli.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, mesti stuðul er 250.000 krónur

Verkætlanir hava fyrimun:

- um tær eru nýskapandi
- um tær eru eitt nýtt framtak
- um tær eru á okkara fokusmarknaðum, sum teir eru lýstir í ætlanini fyri marknaðarføring av Føroyum sum ferðafólkalandi
- um fleiri partar taka lut

Verkætlanir skulu ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini.

### Umsóknir og umsóknarfreist

Umsóknir skulu sendast VisitFaroeIslands á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður á heimasíðu Uttanríkisráðsins, www.mfa.fo.

**Umsóknarfreistin er 26. mars 2010.**

### Fleiri upplýsingar

Fleiri upplýsingar um treytir og tilfar fáast á www.mfa.fo og við at seta seg í samband við Per Hansen á VisitFaroeIslands, telefon 30 61 00.

SENDISTOVAN

visitfaroeislands
Tinganes · 110 Tórshavn
Tlf +298 30 61 00 · Fax +298 30 61 05 · www.mfa.fo



NB marine

Marek

Báturin til alla familjuna

Tel: 28 88 03
www.marek.fo






## Hevur tú hund?

**So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL**

**SPECIAL – 20 kg kr. 450,-**

Turrfóður til vaksnar hundar. Sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.

**Bilegg beinleiðis á netinum**

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# ÍSLENDSKUR LESTRARSTUÐUL

Íslendska Mentamálaráðið bjóðar føroyingum at søkja stuðul (120.000 ísl.kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum máli og bókmentum á Háskóla Íslands lestrarárið 2010/2011

Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentunum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september 2010 og endar 30. apríl 2011.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. mars 2010. Umsóknarblað og kunning fáast á www.hi.is, www.setur.fo ella við at venda sær til Setursskrivstovuna.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo